> - *Taka føroyingar sum teir fyrstu undir við ætlanunum, so setir tað tykkum í eina heilt serstaka støðu, tí tey, ið koma út við ætlanunum fyrst, kunnu vera við at lyfta tað*

landið kostar ikki meiri enn ein undirsjóvaltunnil, sigur Finn Helmer og vísir á, at ein tunnil kostar nógv meiri enn ein ferja, men at tað avgjørt loysir seg í longdini við at hava tunnil. Á sama hátt er tað við at leggja fipurnet út, tað kostar nógv at leggja, men tað er ein íløga inn í framtíðina og loysir seg avgjørt, heldur Finn Helmer.

### Samsvarar við Visjón 2015

Finn Helmer hevur í fleiri ár víst á, at 10 gigabit fipurnet eigur at verða lagt út í hvørt heim. Tann boðskapin hevur hann ført fram í Danmark í nógv ár, og nú vendir hann sær eisini til Føroya, har hann sær nógvar fyrimunir.

- Ætlanin hjá landsins politikkarum er, at Føroyar skulu vera millum heimsins fremstu lond í 2015. Verður fipurnet lagt kring alt landið, hava vit tikið eitt risa fet rætta vegin, tí tá verða Føroyar ikki millum heimsins fremstu lond á økinum, men Føroyar verða langt fremst í deildini, greiðir Finn Helmer frá.

Hansara greiða fatan er hon, at tað ber ikki til yvirhála, við at ganga í fótasporunum hjá øðrum.

- Einasti máti at yvirhála upp á er við at seta ferðina upp, og tað gera vit við at leggja 10 gigabitnet út í hvørt heim. Møguleikin er har, og tað er bara at taka av honum, sigur Finn Helmer.

### Føroyar á heimskortið

Orsøkin til, at Føroyar eru áhugaverdar fyri Finn Helmer og hansara 10 gigabit verkætlan er, at tað eru fleiri ymiskir fyrimunir við Føroyum í mun til Danmark og onnur lond.

Fyrimunurin við at royndarkoyra nýggja netið í Føroyum er, at teir kunnu vísa á, at her er eitt heilt land har øll hava 10 gigabitnet í húsinum, og tað riggar.

- Tað riggar minni væl, tá vit siga, at í Danmark er tað ein partur av landinum, har tey brúka hetta slagið av breiðbandi, í staðin fyri, at eitt heilt land hevur tikið hesa skipan til sín. Tú kanst ætla, at tað hevur størri slagkraft, greiðir Finn Helmer frá.

Við øðrum orðum merkja orðini hjá Finn Helmer eisini, at íbúgvatalið í Føroyum er til at hava við at gera, har vit ikki eru ov smá til at vera onkisigandi, og samstundis ikki ein ov stórur biti hjá teimum at gloypa í einum.

Eitt annað, sum gera Føroyar áhugaverdar, er góða fjarskiftissambandið við umheimin, vit hava í Far-Ice-kaðalinum, ið var lagdur tikin í nýstlu í 2004.

- Taka føroyingar sum teir fyrstu undir við ætlanunum, so setir tað tykkum í eina heilt serstaka støðu, tí tey, ið koma út við ætlanunum fyrst, kunnu vera við at lyfta tað, fortelur Finn Helmer og leggur so aftrat, at sjálvandi fær eitt land ágóðan av at vera við at lyfta eina slíka skipan sum hesa.

### Helmer aftur í august

Samrøðan við Finn Helmer varð gjørd fyri einari tíð síðani, tá hann var í Føroyum. Greitt er, at hann tá tosaði við bæði Formula, Føroya Tele og umboð fyri Føroya Landsstýrið. Av tí, at summarfrítíð er, vísir tað seg at vera ógvuliga trupult at fáa fatur á røttu fólkunum at gera viðmerkingar til málið.

Sosialurin hevur tó fingið váttað, at gongd er í málinum og eisini greitt, at Finn Helmer hevur ætlanir um at koma aftur til Føroya síðst í august mánaði, og um ikki annað verður helst okkurt nýtt at frætta tá.

## FAKTA

Finn Helmer er føddur í 1949 og býr í dag Sveits. Hann er dani, og gjørdist í 2000 landskendur í Danmark fyri søluna av fyritøku síni GIGA. Hann byrjaði KT-fyritøkuna í 1992 við seks fólkum knýttum at sær. Átta ár seinni hevði henda sama fyritøka 130 í starvi og eitt yvirskot áljóðandi 340 milliónir.

Síðani seldi Finn Helmer GIGA til amerikonsku fyritøkuna Intel Corporation fyri heilar 9,7 milliardir krónur. Samstundis varð hann settur í starv sum stjóri hjá Intel Danmark. Sølan av GIGA til Intel Corporation fór í søguna sum ein tann størsti handilin í Danmark nakrantíð.

Sjálvur kallar Finn Helmer seg íverksetara, og tað virksemið byrjaði hann tíðliga. Longu sum 11 ára gamal fór hann undir býfluguhald, og í dag er hann størsti býfluguhaldarin í Danmark.

Finn Helmer hevur sjálvur byrjað ella verið við at byrjað 40 fyritøkur, og verður hann eisini sera ofta nýttur av nýggjum fyritøkum, sum vanta góða vegleiðing.

Eisini er Finn Helmer sera vælumtóktur fyrilestrarhaldari, tí hann hevur royndir, sum fá onnur hava.

-rwd




Vika 32

# Fleiri rentuhækkingar í væntu

MARKNAÐARRÁK

Farna vikan var rættiliga hendingarík. Hósdagin hækkaði ECB rentuna 0,25%-stig til 3,00%. Hetta var væntað. Men tað var ikki væntað, at stjórin, Trichet, fór at vera so greiður um, at fleiri rentuhækkingar eru í væntu. Tað vakti ans, at hann legði serligan dent á, at rentupolitikkurin hjá ECB verður lagdur meir eftir støðugum prísvøkstri enn búskaparvøkstri. Hetta tálmaði partabrøvunum. Fríggjadagin varð kunngjørt, at amerikanski arbeiðsmarknaðurin er veikari enn íleggjarar mettu. Hetta vendi gongdini á bæði partabræva- og lánsbrævamarknaðunum. Partabrøv í Evropa vóru á leið óbroytt, tá vikan endaði.

### Lánsbrævarentur á sama stigi

10-ára danska rentan hækkaði fyrst 0,09%-stig tá ECB avdúkaði, at fleiri rentuhækkingar eru í væntu. Hon lækkaði tað sama dagin eftir, tá vánaligu arbeiðsmarknaðartølini vóru kunngjørd. So vikan endaði á sama stigi sum hon byrjaði, 10-ára rentan er 3,96%.

### Roknskapir betri enn væntað

Eins og alt annað vóru partabrøv ávirkaði av bæði tíðindafundinum hjá Trichet og vánaligu arbeiðsmarknaðarfrágreiðingini úr USA. Hóast hetta hevur partabrævamarknaðurin verið rættiliga friðarligur hesa farnu vikuna. Roknskapirnir fyri 2. ársfjórðing eru í andgletti, og teir hava sum heild verið góðir. Nú 423 av teimum 500 virkjunum í amerikanska S&P500-vísitalinum hava kunngjørt roknskap, hava 300 kunngjørt ein roknskap sum var betri enn væntað. Inntøkurnar eru hækkaðar í miðal 16% seinasta árið.

### Hesa vikuna

Týskvøldið í hesi vikuni verður altavgerandi fyri virðisbrævamarknaðirnar. Tá hevur amerikanski tjóðbankin rentufund, og fyri fyrsti ferð í 2 ár er stórur ivi um, hvat fer at henda. Spenningur er eisini um, hvat stjórin, Bernanke, fer at siga. Um rentan ikki verður hækkað, stuðlar hetta undir bæði láns- og partabrøvum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 580,96 | -0,6% |
| JPY | 5,05 | -1,0% |
| GBP | 1.107,85 | 1,5% |
| NOK | 94,54 | -0,4% |
| SEK | 81,24 | 0,2% |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 97,72 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 108,15 | -0,7% |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** |
| Atlantic Petroleum | 565,00 | 0,0% |
| KB Trygg Eurostoxx | 103,22 | 0,3% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*